**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*





*Tað verður á alternativa, franska tónleikafestivalinum Trans Musicales, sum er í Rennes í desember, at Orca skal framføra saman við Yann Tiersen*
*Mynd: Høgni Egholm Magnussen*

tosað um, at vit burdu arbeitt saman við onkrum. Hann hevði m.a nevnt íslendsku Bjørk, men hevði einki svar fingið enn, so hann hevði nú sett seg í samband við Yann Tiersen. Tað er hann, sum hevur skrivað allan tónleikin til franska stórfilmin »Amélie«, sum bleiv nomineraður til fimm Oscar virðislønir og vann fleiri aðrar virðislønir fyri bæði besta tónleik og besta film.

**Samstarvið við Yann Tiersen**

- Yann Tiersen vísti seg at vera ógvuliga áhugaður. Hann var í løtuni í París og tók fløgu upp men fekk sær frí og kom til Rennes fyri at møta okkum. Tað var rættiliga imponerandi, og hann var ordiliga blíður og fittur. Vit høvdu ein produktiónsfund við fimm av teknikarunum frá teaturinum, har vit skulu framføra, pluss øllum teimum átta frá festivalinum. Og eg fann tá útav, at vit vera einasti bólkurin, sum skal spæla meira enn eina konsert á festivalinum, og sum fær eitt høli bara til sín og ongan annan. Tað er fantastiskt. Onkur av konsertunum verður enntá bara fyri innboðin fólk; pressu og ídnaðarfólk osfr.

- So vit skulu nú arbeiða saman við Yann Tiersen við at seta sýningina upp til Trans Musicales. Hann hevur bjóðað mær at koma og vitja aftur áðrenn festivalin, og tað kann eisini vera, at hann kemur upp her ein túr, so vit kunnu arbeiða eitt sindur meira uppá hetta projektið. Eg skal faktiskt byggja eitt ljóðføri til hann at spæla á, so tað hevði verið nokso væl hóskandi. Vit flúgva annars niður har eina viku áðrenn festivalin fyri at seta upp og gera klárt. Vit fáa ljóð og ljós fólk hvønn dag, sum skulu hjálpa okkum at gera klárt í teaturinum. Faktiskt eiga við hetta hølið tær tvær vikurnar, vit eru har. Tað eru bara vit, sum skulu framføra har inni; seks konsertir í alt, og vit fara at hava hús fyri okkum sjálvar beint við síðun av. Tað er nógv for genialt, sigur Jens smílandi.

**Aðrar tónleikaverkætlanir á skránni**

- Eg eri við í fleiri projektum umframt Orca. M.a Knút Eysturstein og Petur Pólson. Steso hjá Hergeir Staksberg og Gestir, sum eg skal spæla nakrar konsertir við í London nú í summar. Umframt tað arbeiði eg saman við einum vinmanni, sum eg møtti í London, við at taka upp tríggjar fløgur hjá honum, allar í enskum sangskrivara stíli. Í løtuni eri eg eisini involveraður í einum projekti, sum kallast Power Oyster. Tað er punkur við nøkrum powerballadum, sum bleiv skrivað og tikið upp uppá tveir dagar fyri fimm árum síðani, tá vit vóru nakrir, ið høvdu drukkið eitt sindur ov nógv av kaffi og sovið nógv for lítið. Nú hava vit miksað tað uppá tveir-tríggjar dagar og fara at geva tað út skjótt; fyrst sum kasettuband nú í vikuskiftinum, tá vit skulu spæla okkara fyrsta gigg. Tað fer at koma út á vinyl seinni, men vit hava ikki avgjørt enn, um tað skal gevast út á fløgu.

- Annars er tað Orca, sum eg arbeiði miðvíst við í løtuni; í øllum førum fram til jóla. M.a við at útbyggja kontakt netverk, geva fløguna út í Fraklandi osfr. Eg møttist nevniliga eisini við einum booking agenturi, meðan eg var í Rennes, sum ætlar at geva »Livandi Oyða« út har áðrenn Trans Musicales. Vit fara nokk eisini at taka alt upp, meðan vit eru har, á multitrack og video og væntandi geva tað út sum DVD einaferð seinni.

**Næsta stigið**

- Umframt alt hetta, projektið, spennandi avtalurnar, framførslurnar osfr, fáa vit eisini tann stóra møguleika at gera neyva og vælframleidda list saman við einari av okkara stóru inspiratiónskeldum, nevniliga Yann Tiersen. Hetta er ótrúliga nógv í okkara eygum, tí teir flestu í Orca hava verið hugtiknir av hansara tónleiki í fleiri ár nú.

- Desember mánaðin fer annars at diktera tað næsta, sum skal henda hjá okkum. Beint nú hugsi eg bara um at útvikla Orca meira. At gera svakari og stuttligari ting við tónleikinum; avprøva grensur osfr, greiðir Jens frá.

- Samstarvið við Yann Tiersen á Trans Musicales kann blíva stórt fyri Orca. Festivalurin er nevniliga kendur fyri at lansera nýggjar bólkar, og fólk hyggja nógv har yvir fyri at uppdaga nýggj nøvn. Tað er m.a har Lenny Kravitz, Nirvana, Portishead og Beastie Boys hava fingið sítt startskot. Men eingin veit enn, hvat fer at henda. Vit fara í øllum førum at gera alt tað, ið vit kunnu, fyri at fáa framførslurnar so góðar sum yvirhøvur gjørligt. So taka vit tað harfrá.

*- Næstan allir í Orca hava verið ógvuliga hugtiknir av tónleikinum hjá Yann Tiersen nú í fleiri ár, og tað verður ótrúliga spennandi hjá okkum at sleppa at skapa list saman við einari so stórari inspiratiónskeldu, sigur Jens L. Thomsen*
*Mynd: Høgni Egholm Magnussen*



**Tíðindi um:**

# B.A.B.Y (FO) og Trentemøller (DK)!

**Í kvøld verður ein vanligur føðingardagur fyri tvey vanlig fólk á einari vanligari barr onkrastaðni mitt í Keypmannahavn. Men tað er ikki nakar vanligur listi av DJ'um, ið skulu spæla til hendan føðingardagin**

Skráin stendur nevniliga av trimum av størstu donsku DJ'unum nakrantíð; Trentemøller, Djuna Barnes og Kjeld Tolstrup og afturat teimum ongum minni enn føroyska Brynjolfi á Heygum, eisini kallaður B.A.B.Y.

- Tey, sum hava føðingardag, eru vinfólk hjá mær. So ein dagin, tá eg og Djuna sótu og snakkaðu um hendan føðingardagin, kom tað bara fram, at eg – ella faktiskt B. A.B.Y – burdi verið »special guest DJ« til veitsluna. Og soleiðis hendi tað bara, greiðir Brynjolfur frá um, hvussu hann er sloppin uppí part hetta kvøldið.

- Tað vera eg; Trentemøller, sum øll sikkurt kenna; Djuna Barnes, sum er millum feitastu DJ'arnar í Danmark í løtuni; og Kjeld Tolstrup, sum hevur verið mega stórur síðani 80ini og hevur spælt á øllum teimum størstu klubbunum í heiminum.

- Tað er mega løgið, tí tað hendir so knapliga; hetta at fara frá ongum til teir bestu ella soleiðis. Tað kitlar í búkinum, og eg royni at fyrireika meg ordiliga nógv. Vóni at kunna imponera eitt sindur, tí so kann jú vera, at mann sleppur at gera tað aftur. Eg royni í øllum førum at brúka tær kontaktirnar, sum eg havi, og tað byrjar at geva úrslit, sigur Brynjolfur glaður og róligur.

B.A.B.Y alias
Brynjolfur á Heygum

